# Aðalfundur

Ársaðalfundur Starvsmannafelagsins verður leygardagin 12. mars 2011 kl. 10.00 í Norðurlandahúsinum.

**Skrá fyri aðalfundin:**
1. Frásøgn formansins frá
a) farna ári og
b) virki felagsins framyvir.
Gestarøðarar: Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag.

2. Framløga av grannskoðaðum roknskapum til góðkenningar.
3. Møguligar lógarbroytingar
4. Møgulig uppskot frá limum og nevnd.
5. Ásetan av limagjøldum.
6. Val av 2 nevndarlimum og 2 tiltakslimum.
7. Val av grannskoðara og tiltakslimi.
8. Ymiskt.

Limir, sum vilja hava uppskot til umrøðu á aðalfundinum og møgulig lógaruppskot, mugu senda nevndini hesi í seinasta lagi leygardagin 5. mars 2011.

**STARVSMANNAFELAGIÐ**

# Aðalfundur

Ársaðalfundur í Eftirlønargrunni Starvsmannafelagsins verður hósdagin 17. mars 2011, kl. 19.00 í hølum felagsins J.H. Schrøtersgøta 9.

**Skrá:**
1. Frásøgn um virki grunnsins í farna roknskaparári.
2. Framløga av grannskoðaðum ársrokniskapi til góðkenningar.
3. Viðtøkubroytingar.
4. Val av nevndarlimum.
5. Ymiskt.

Limir sum vilja hava uppskot til umrøðu á aðalfundinum og møgulig lógaruppskot, mugu senda nevndini hesi í seinasta lagi hósdagin 10. mars 2011.

**NEVNDIN**

Reyði Krossur Føroya

# Rinda limagjaldið

og møt á aðalfundinum 27.03.11 kl. 14:30

**Tú kanst gjalda til:**

| | |
|---|---|
| **Norðoya Sparikassa:** | 9865-100.377.6 |
| **Suðuroyar Sparikassa:** | 9870-405.138.7 |
| **Bank Nordik:** | 6460-494.695.4 |
| **Eik:** | 9181-495.001.3 |

Reyði Krossur Føroya

Limagjald húski kr. 150,-, feløg kr. 400,-

Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya

# TÍÐARAVMARKAÐ STARV Á FRÓÐSKAPARSETRI FØROYA

Starvið sum kliniskur útbúgvingarleiðari í tíðarskeiðnum 1. apríl 2011 til 31. januar 2014 er leyst at søkja á Fróðskaparsetri Føroya/Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya

**Lýsing av starvinum**
Kliniskur útbúgvingarleiðari er leiðari fyri kliniska útbúgvingarpartinum av útbúgvingini til sjúkrarøktarfrøðing og hevur harumframt ábyrgd av klinisku vegleiðaraútbúgvingini.

**Faklig krøv**
Sjúkrarøktarfrøðingur við hægri útbúgving á masterstigi og kliniskum royndum í minsta lagi 5 ár.

**Førleikakrøv**
Holla vitan um útbúgvingina til sjúkrarøktarfrøðing, skjalfestar námsfrøðiligar royndir, bæði kliniskar og ástøðiligar, leiðsluførleika og/ella leiðsluroyndir og góð samskiftis- og samstarvsevnir, hartil kemur granskingarførleika og/ella granskingarroyndir.
Leiðsluførleika og/ella leiðsluroyndir
Góð samskiftis- og samstarvsevnir.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

**Umsóknarfreistin er 3. mars 2011**

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Súsonnu Mortensen á tlf. 292255 ella til Ásu Róin, tlf. 292254.

Umsóknir við CV og prógvum og møguligum vísindaligum ritgerðum skulu sendast til:

Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya
Jónas Broncks gøtu 25
FO-100 Tórshavn
Merkt: umsókn

**SJÚKRARØKTARFRØÐISKÚLI FØROYA**
Jónas Broncksgøta 25 · FO-100 Tórshavn · tel: 352 250
fax: 352 251 · heimasíða: srfs.fo · t-postur: srfs@srfs.fo

**Til sølu**
**Jørð og hús í Kvívík**

Um hóskandi boð verða givin eru hús matr. nr. 41.A
Og tvær gillin í presthaga matr. nr. 40A til sølu

**Tlf. 21 97 26**

Fróðskaparsetur Føroya

# VÍSINDASTARVSFÓLK Í SJÚKRARØKTARFRØÐI Á FRÓÐSKAPARSETRI FØROYA

Á Sjúkrarøtarfrøðiskúlanum á Fróðskaparsetrinum er eitt granskingar- og undirvísingarstarv í sjúkrarøkt leyst at søkja.
Tann, ið sett/ur verður, skal serliga virka fyri at menna gransking og útbúgving í sjúkrarøkt á Fróðskaparsetrinum.

**Starvsøki**
Granskingarparturin verður knýttur at serøki umsøkjarans, men umsøkjarin skal eisini vera sinnaður at granska í sjúkrarøkt í Føroyum. Samstarv við aðrar mentanarstovnar og onnur fakøki innan- og uttanseturs er týdningarmikið í starvinum.

Undirvísingarparturin fevnir um útbúgvingar og skeið á masterstøði á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum. Menningarparturin fevnir um førleikamennandi skeið til vísindastarvsfólk á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum, so tey kunnu fara undir gransking og PhD-útbúgving. Harumframt skal umsøkjarin virka fyri at vísindastarvsfólk á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum fáa førleikamennandi skeið at búgva seg til at fara undir gransking og PhD-útbúgving.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu umframt kandidatútbúgving í sjúkrarøktarfrøði (cand.cur. ella cand.scient.san.) hava granskingarførleika á lektarastigi, undirvísingarroyndir og góð samstarvsevni.

Við umsóknini skulu, umframt CV og lýsing av egnum granskingarprofili og framtíðarætlanum umsøkjarans við starvinum, eisini fylgja yvirlit yvir øll vísindalig avrik umsøkjarans. Tey 10 bestu vísindaligu avrik umsøkjarans skulu leggjast við umsóknini í fýra eintøkum.
Starvið verður sett í samsvari við førleikameting hjá metingarnevnd, og ein setanarnevnd gevur rektaranum tilmæli um, hvør setast skal.

**Umsókn**
Umsóknarfreist er 21. mars 2011.
Starvið verður sett 15. august 2011 ella eftir avtalu.

Løn og starvstreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.
Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til rektaran fyri Sjúkrarøktarfrøðiskúlan Súsonnu Mortensen, tlf. 352250/292255, susannam@setur.fo ella til rektaran á Fróðskaparsetri Føroya, Jóan Pauli Joensen, tlf. 352503/292503, jopajo@setur.fo.
Umsóknir við avriti av prógvum, ævisøgu (CV), vísindaligum avrikum og lýsing av granskingaprofili og framtíðarætlanum v.m. skulu sendast til:

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovuna
J. C. Svabos gøtu 14
Postrúm 272
FO-110 Tórshavn
tlf. 35 25 00